# Vit gera alt fyri at varðveita okkara part av flutninginum

**- og vit fara eisini at bjóða okkum fram í eini komandi oljuvinnu, sigur nýggi sølustjórin hjá Skipafelagnum Føroyar**



*Tórheðin Jensen, sølustjóri á Skipafelagnum Føroyar.*

1. apríl tók Tórheðin Jensen við sum sølustjóri á Skipafelagnum Føroyar. Síðani tá hevur hann arbeitt á deildunum í Danmark, har hann hevur kunnað seg við arbeiði har, og er nú júst byrjaður á høvuðsdeildini í Havn.

Tórheðin er gøtumaður, og hevur útbúgving frá Den Danske Eksportskole í Herning. Spurdur um hvat hann heldur um framtíðina hjá Skipafelagnum Føroyar nú nógvir kappingarneytar stríðast hvør í sínum lagi um ein avmarkaðan marknað, sigur hann, at einki felag yvirlivir av gomlum vana. Serliga ikki tá kappingin er hørð.

Eg ætli mær í hvussu er at gera mítt til at Skipafelagið alla tíðina tillagar seg til marknaðarkrøvini. Andlitið hjá Skipafelagnum úteftir má eisini alla tíðina endurnýggjast, sigur Tórheðin.

Ein av tykkara kappingarneytum ætlar at byggja eitt skip fyri meira enn hálva milliard, ein annar ætlar at fara undir sigling millum Skotland og Føroyar. Hvat heldur sølustjórin um hesar ætlanir?

– Vit vita enn nakað lítið um hesar ætlanirnar, og vita tí heldur ikki hvat tað fer at merkja fyri okkum, so vit gera einki drastiskt sjálvir. Men vit hava sjálvandi okkara framtíðarætlanir, sum eg ikki ætli mær at siga frá her.

Sum so mong onnur feløg, var eisini Skipafelagið gjøgnum eina harða kreppu, men nú er vent í holum, sigur Tórheðin:

– Nú sigla skipini alla tíðina full, so vit hava verið noydd at leiga eitt skip afturat at hjálpa til. Harafturat hava vit eisini eitt skip, sum siglir til Canada eftir rækjum frá føroyskum skipum. Rækjurnar verða fluttar til Hirtshals. Eisini hevur skipið nakað av føroyskum laksi til Canada. Talið av útlendskum skipum, sum koma í føroyska havn, og sum Skipafelagið umboðar, hevur verið í stórum vøkstri. Síðani 1995 er tað trífaldað og fer í ár væntandi upp um 400.

Um framtíðina hjá Skipafelagnum sigur Tórheðin Jensen, sølustjóri.

– Vit ætla at berjast av øllum alvi at varðveita okkara part av marknaðinum av flutningi úr Føroyum og til Føroya. Vit ætla eisini at bjóða okkum fram í eini komandi oljuvinnu og verða við á messuni í Aberdeen 7. - 10. september í ár.


## Marel-sjótøkni frá Formula Xerox

### - ein kollvelting innan fiskahagreiðing umborð





**Uppgávur**
- reinskering
- skiljing
- portionering
- pakking

**Eginleikar**
- kompakt design
- lætt at halda
- egnað til harðført umhvørvi
- minni handfaring av veiðuni

formula XEROX

Marel
www.marel.is

Spyr eftir Hans Paula Petersen og fá nærri upplýsingar og ókeypis uppskot til verksmiðju-uppseting v.m.

Formula Xerox * Stiðjagøta 5 & 11 * Postboks 1078 * 110 Tórshavn

Tlf. 31 11 15 * Fax 31 71 15 * E-postur: formula@formula.fo * Heimasíða: www.formula.fo